**10 TING UM** Jon Stewart

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



# Happaður í skúlanum

HANN ER EIN TANN STUTTLIGASTI SJÓNVARPSVERTURIN Í USA, OG Í SATIRU-SENDINGINI **THE DAILY SHOW**, SUM EISINI VERÐUR SEND Í FØROYUM, LOYVIR HANN SÆR BÆÐI EITT OG ANNAÐ. OG HER ER YMISKT, SUM TÚ KANSKA IKKI VISTI UM **JON STEWART**

**1** Jonathan Stuart Leibowitz, sum er hansara fulla navn, vaks upp í einari jødiskari familju í New York. Tá hann var 11 ára gamal, fóru foreldrini frá hvørjum øðrum, og Jon hevur ikki havt samband við pápa sín síðani.

**2** Jon Stewart sigur, at hann var illa happaður í skúlanum fyri at verða jødiskur drongur. Men tá hann tók prógv á Lawrence High School var hann valdur sum tann stuttligasti næmingurin á skúlanum.

**3** Hann møtti konu sínari á einari sonevndari „blind date". Fýra ár seinni, í 2000, giftust Jon Stewart og Tracey McShane. Jon fríggjaði til konuna við einari serligari krossorðgátu, sum konan skuldi loysa.

**4** Jon Stewart og familjan hava síðani 2005 búð á Manhattan í New York, har tey keyptu eina penthouse íbúð fyri góðar 30 milliónir krónur.

**5** The Daily Show hevur verið sent síðani 1996, og í januar mánaði 1999 tók Jon Stewart við sum vertur í sendingini, sum verður fýra ferðir um vikuna á Comedy Central í USA. Sendingin verður eisini send í fleiri øðrum londum – eitt nú hjá SvF í Føroyum.

**6** Tá ið flest fólk hava hugt eftir The Daily Show í USA, hava 2,3 milliónir hyggjarar verið.

**7** Hóast Jon Stewart er mest kendur sum vertur í The Daily Show, hevur hann spælt við í fleiri filmum og sjónvarpsrøðum. Hann hevur eisini havt serligar gestaframførslur í røðum sum *The Simpsons, American Dad* og *Spin City.*

**8** Um tær ikki dámar tíðindasendingar, so er hetta mótsendingin, sum tú kanst hyggja eftir, er Jon Stewart endurgivin fyri at siga um The Daily Show.

**9** Jon Stewart sigur, at hann fær størst íblástur, tá hann missir svønin.

**10** **The Daily Show er blivið betur og betur umtókt, síðani Jon Stewart gjørdist vertur, og hann hevur vunnið fleiri virðislønir í USA fyri vertsleiklutin.**

## SITAT



Lívið er tað, sum hendir hjá tær, meðan tú hevur úr at gera við at leggja aðrar ætlanir.

***John Lennon***

## MIÐLARNIR OG EG



Í nýggja táttinum siga kendir og ókendir persónar frá síni miðlanýtslu.

**EYÐGUNN SAMUELSEN**, LØGTINGS-KVINNA HJÁ JAVNAÐARFLOKKINUM, HEVÐI YNSKT, AT FLEIRI TILTØK VÓRÐU ÚTVARPAÐ.

**DAG- OG VIKUBLØÐ**
Sosialin og Dimmalætting lesi eg altíð. Havi onkutíð keypt onkur vikubløð, men ikki regluliga.

**HEIMASÍÐUR**
Eg vitji føroysku portalarnar, portal.fo, nordlysid.fo og kringvarp.fo. Onkuntíð eri eg inni á Sandoyar- og Suðuroyar portalunum. Av útlendskum síðum er tað mest dr.dk og kvinfo.dk, ið eg lesi fyri at orientera meg.



**TÓNLEIKUR**
Eg lurti eftir øllum millum himmal og jørð. Mær dámar væl nýggjan tónleik, sum til dømis Guðrið Hansdóttir. Eg lurti eftir tónleiki, tá eg skal rudda ella gera mat. Av gomlum tónleiki lurti eg mest eftir bólkunum TV2, Tinganest og Frændum.

**ÚTVARP**
Lurtið eftir tíðindasending-unum hjá Kringvarpinum og Rás2.

**DVD**
Seinasta dvd, eg hugdi eftir, var »Føroyskar søgur«. Eg undirvísi í søgu, og tað var tí, eg hugdi eftir hesum. Annars havi eg ikki tíð at hyggja at filmum.



**SJÓNVARPSRØÐ**
Sendingina »Krøniken« dámdi mær sera væl. »Desperate Housewifes« haldi er ómetaliga stuttligt og passar væl til mín.

**BØKUR**
Eg lesi einar fýra bøkur um mánaðin. Beint nú lesi eg »Chockdoktrinen« av Naomi Klein. Eg plagi at vera á bókasavninum einaferð um mánaðin. Húsini eru full av bókum, so eg royni ikki at keypa so nógvar.




**MAGASIN**
Ugebrevet A4, sum LO í Danmark gevur út, lesi eg. Weekendavisen haldi eg er áhugaverd – og blaðið Information.

**TELEFON**
Eg havi eina gamla Ericsson telefon, sum eg brúki at ringja og smsa við. Havi leingi ætla mær at skift hana út.

**HVAT VIL TÚ IKKI BRÚKA TÍÐ UPPÁ?**
Bløð, sum mæla til at man skal skifta út og endurnýggja, eri eg ikki áhugað í. Eg vil lesa og ganga til tiltøk, heldur enn at keypa nýtt til heimið.

**HVAT IRRITERAR TEG Í MIÐLUNUM?**
Tvætlut tos fyri at fáa tíðina at ganga, spæl góðan tónleik ístaðin.

**HVAT VIL TÚ HAVA MEIRI AV Í MIÐLUNUM?**
Fleiri kjaksendingar og at fleiri tiltøk verða varpað út. Tað nýtist ikki at kosta tað stóra bara, at hava eina mikrofon til staðar.

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Tórnroos